# SETHÚSAMARKNAÐURIN

## HÚS TIL SØLU

**Mál nr. 302**
Adr.: Norðuri í Sundum,
410 Kollafjørður
Stødd á sethúsum: 66 m² x 3
Stødd á grundøki: 300 m²
Byggiár: Uml. 1907 (bygt uppí 1985)
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

**Mál nr. 313**
Adr.: Undir Krákugjógv 13, 100 Tórshavn
Stødd á tvíhúsum: 38 m² x 2 + kjallara
Stødd á grundøki: Uml. 424 m²
Byggiár: 1945
Kostnaður: Kr. 1.000.000,- ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 322 (Tvíhús í gerð)**
Adr.: Heygsgerði, 100 Tórshavn
Stødd á tvíhúsum: 67,9 m² í tveimum hæddum + loft
Stødd á grundøki: Uml. 300 m²
Byggiár: 2004
Kostnaður: Kr. 1.500.000,-

**Mál nr. 326**
Adr.: 340 Kvívík
Stødd á sethúsum: 112 m² x 2
Stødd á grundøki: 546 m²
Byggiár: 1989
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

**Mál nr. 327**
Adr.: 420 Hósvík
Stødd á sethúsum: 147,7 m² + loft
Stødd á grundøki: 731 m²
Byggiár: 1989
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

**Mál nr. 328**
Adr.: J. Dahlsgøta 2, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 195,5 m² + 125 m² + loft
Stødd á grundøki: 307 m²
Byggiár: 1970
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

**Mál nr. 331**
Adr.: Tungugøta 9, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 62 m² + loft 48 m² og kjallara 65 m²
Stødd á grundøki: 219 m²
Byggiár: 1934
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

**Mál nr. 332**
Adr.: Dalavegur 47, 100 Tórshavn
Stødd á sethúsum: 153 m² x 2
Stødd á grundøki: 506 m²
Byggiár: 1992
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

**Mál nr. 334**
Adr.: Signabøur
Stødd á sethúsum: Uml. 95 m² + loft
Stødd á grundøki: 702 m²
Byggiár: 1980
Kostnaður: Kr. 950.000,- ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 336 (tvíhús í gerð)**
Adr.: Suðuroyarvegur, Tórshavn
Stødd á húsum: 9,1 x 7,55 m² (útv. mát + loft)
Stødd á grundøki: Uml. 356 m²
Byggiár: 2004
Kostnaður: Kr. 1.450.000,-

**Mál nr. 337**
Adr.: Norðuri í Sundinum, Kollafjørður
Stødd á sethúsum: 40 m² x 2 + loft
Stødd á grundøki: 1250 m²
Byggiár: 1930
Kostnaður: Kr. 750.000,- ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 338 (tvíhús í gerð)**
Adr.: Undir Gráasteini, Tórshavn
Stødd á húsum: 9,1 x 7,55 m² (útv. mát + loft)
Stødd á grundøki: Uml. 308 m²
Byggiár: 2004
Kostnaður: Kr. 1.450.000,-

**Mál nr. 339 (Handilsbygningur)**
Adr.: Í Støð, Fuglafjørður
Stødd á bygningi: 176 m² x 2
Stødd á grundøki: Uml. 267 m²
Byggiár: 1998
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

**Mál nr. 340**
Adr.: 900 Vágur
Stødd á sethúsum: 72 m² + loft og kjallara
Stødd á grundøki: Uml. 578 m²
Byggiár: Uml. 1928/29 – bygt uppí uml. 1965
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

**Mál nr. 341**
Adr.: Gillagøta 16, 188 Hoyvík
Stødd á sethúsum: 126 m²
Stødd á grundøki: 546 m²
Byggiár: 2002
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

**Mál nr. 342**
Adr.: Lonarstræti 5, 360 Sandavágur
Stødd á sethúsum: 48 m² x 2 + kjallara
Stødd á grundøki: 454 m²
Byggiár: Uml. 1942
Kostnaður: Kr. 850.000,- ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 343**
Adr.: Marknagilsvegur 87, 2.v., 100 Tórshavn
Stødd á íbúð: 67 m² + úthús
Stødd á grundøki: Felags
Byggiár: 2003
Kostnaður: Kr. 1.100.000,- ella hægsta boð yvir

## GRUNDØKI/JØRÐ

**Mál nr. 568**
Adr.: Øravíkarlíð, 826 Trongisvágur
Vídd á grundøki: 608 m²
Kostnaður: 60.000,- ella hægsta boð yvir

**Mál nr. 571**
Adr.: Húsgarð, 826 Trongisvágur
Vídd á grundøki: 805 m² + 109 m²
Kostnaður: 60.000,- ella hægsta boð yvir

***Vit hava eisini onnur sethús, sum ikki eru lýst í blaðnum. Støkk inn á gólvið.***

## Húsamekling

**Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,**
**Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo www.husamekling.fo**
**Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16**


## Tvingsilssøla

Fríggjadagin, 8. oktober, kl. 09.00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 840f, Klaksvík (AS nr. 2-14/2004).

Sambært tryggingarskjalinum er talan um sethús, sum er 122 kvm.

Húsini eru nærri innrættað soleiðis:

Miðhædd: 2 inngongdir: lítil durur, lítið wc við vaski, gongd við garderobu, køkur, stova og trappa upp á loft, og eitt óinnrættað rúm v/ trappu niður í kjallaran.

Loft: 5 kømur, opin sjónvarpsstova og baðirúm v/ brúsu.

Kjallari: fýrrúm og annars ikki innrættaður.

Tvingssilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4561901), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 6. september 2004*








verða
húsini seld



Finn dreymahúsið
í Sosialinum

SETHÚSAMARKNAÐURIN



# ítróttur

Nr. 173 • leygardagur • 11. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


HB-B36

# Gulldeymur í Gundadali

**Gongur tað eftir vild hjá HB, kunnu teir gerast føroyameistarar sunnudagin, men tað krevur fyrst og fremst, at teir megna at basa grannunum úr B36, sum fyri fyrstu ferð í ár hava allar mans tøkar til ein dyst**


UPPTAKT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Vinnur HB grannauppgerðina móti B36 sunnudagin, og Skála samstundis missir stig móti KÍ, hevur 100-ára føðingardagsbarnið tryggjað sær triðja føroyameistaraheitið á rað.



*Seinastu 12 landskappingardystirnar hevur HB fingið 34 stig til høldar, og stendur tað til teir, so skulu flottu hagtølini ikki vikast sunnudagin*

### Sum ein finala

Tá ið HB tryggjaði sær meistaraheitið í fjør var tað við at vinna á júst B36, og HB-liðskiparin, Rúni Nolsøe, at teir ætla at gera tað sama í ár. – Vit ætla okkum at avgerða kappingina sunnudagin, og vit eru øgiliga uppsettir upp á at vinna dystin, sigur hann. – Talan er í veruleikanum um eina finalu, ið vit skulu vinna, tí annars kann panikkur koma í, og vit hava sera truplar dystir eftir, sigur Rúni Nolsøe.

HB-liðskiparin er sannførdur um, at spælir HB upp til sítt besta, so vinna teir dystin sunnudagin, tí teir hava eitt betri lið enn B36 eftir hansara tykki, og hann vónar at styrkismunurin kemur til sjóndar sunnudagin. – Vit hava havt eina stammu á liðnum seinastu trý árini, men í ár hava vit fingið nakrar leikarar, ið hava gjørt tað framúr, og eg haldi, at liðið í ár er tað sterkasta seinastu trý árini, sigur Rúni Nolsøe. Miðvallarin hjá oddaliðnum heldur, at talan hevur verið um eitt ótrúliga gott ár hjá HB. – Vit hava vunnið Atlantsbikarið og Løgmanssteypið. Nú manglar bert føroyameistaraheitið, og tað ætla vit at tryggja okkum sunnudagin við eitt sindur av hjálp frá klaksvíkingum, sigur Rúni Nolsøe.

Spurdur hvussu tað ber til, at HB hevur so mikið greiða leiðslu í landskappingini, sigur Rúni Nolsøe, at tað eru tað helst fleiri orsøkir til. Hann heldur, at HB-liðið í ár er sterkari enn undanfarnu árini, og harafturat eru fleiri av hinum liðunum kanska eitt vet veikari, enn tey hava verið.

– Vit hava eisini verið rættuliga støðugir, tí vit hava ikki tapt síðani í fyrsta leikumfarinum, meðan hini liðini hava verið eitt sindur meiri óstøðug, sigur HB-liðskiparin.

### Allir mans tøkir

HB tykist hava alt sítt fólk tøkt til dystin sunnudagin. Heine Fernandez og Vagnur Mohr Mortensen hava verið eitt sindur smáskaddir í vikuni, men Rúni Nolsøe roknar fyri vist við, at teir báðir verða klárir til brakið sunnudagin.

Tá ið vit spyrja Rúna, um teir hava gjørt klárt til gullveitslu í HB-húsinum sunnukvøldið, sigur hann avgjørdur, at tað hava teir ikki. – Vit hava gjørt greitt, at tað als ikki verður hugsað um nakra sum helst veitslu, fyrr enn gullið er í hús, men gerast vit meistarar sunnudagin, so ivist eg ikki í, at tað verður veitsla sunnukvøldið, sigur hann.

### Óvanlig støða hjá B36

Venjarin hjá B36, Jóannes Jakobsen, er í einari óvanligari støðu undan brakinum í Gundadali sunnudagin. Tað er nevnliga so, at hann fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum hevur alt fólkið hjá sær tøkt til ein dyst. Tó er Niels Joensen farin av landinum í lestrarørindum, og hann verður ikki at síggja aftur á liðnum í ár.

Ein av teimum, ið hevur leikt nógvar av hesum grannauppgerðunum fyri B36, er liðskiparin John Petersen. Hann fegnast um, at B36 hevur alt fólkið tøkt til dystin móti grannunum, og landsliðsmaðurin er sannførdur um, at B36 kann útseta gullveitsluna hjá HB.

– HB hevur verið øgiliga støðugt í ár, men eg ivist ikki í, at sýna vit rætta hugburðin, og megna vit at fáa okkara spæl at koyra, so kunnu vit spæla fult upp til HB, sigur John Petersen. B36-liðskiparin viðgongur tó, at teir ikki trúgva uppá, at tað ber til at taka FM-heitið frá HB, men skuldi tað óhugsandi hent, so taka teir í B36 gleðiliga ímóti, sigur hann.

Í fyrra dystinum millum liðini vann HB ein greiðan 5-2 sigur, og John heldur, at dysturin í morgin skal prógva, at munurin millum HB og B36 ikki er so stórur. – Vit taptu rímuliga stórt í fyrra dystinum, og vit vilja tí gera nógv fyri at vinna hendan dystin, sigur hann og leggur afturat, at teir tó ikki vænta at fáa nakað forerandi frá grannunum.

Nú FM-møguleikin eftir teirra tykki er rokin, miðja teir í B36 ímóti at tryggja sær atgongumerki til Europa. John Petersen sigur, at megna teir tað, kann árið í ár metast sum góðkent hjá árstalsfelagnum.

### Síðsta grannauppgerðin hjá John

Dysturin millum HB og B36 sunnudagin verður samstundis síðsta grannauppgerðin hjá B36-liðskiparinum. John Petersen og familjan flyta av landinum í næstum, og væntandi ganga tað nøkur ár, áðrenn tey aftur verða at síggja á klettunum.

– Eg fari niður í komandi mánaða, og hetta árið er óivað mítt seinasta í fremstu føroysku fótbóltsdeildini. Man skal sjálvandi aldrin siga aldrin, men dysturin sunnudagin verður óivað mín seinasta grannauppgerð í Havn, sigur John Petersen.

Tey flestu munnu verða samd um, at nú John Petersen ikki longur verður at síggja í føroyskum fótbólti, missir heimliga kappingin helst største profilin seinastu mongu árini. Trupult verður hjá leiðsluni hjá B36 at finna ein nýggjan mann at seta inn fyri John, men óivað er leitanin langt síðani byrjað.

Hvussu verður við fótbóltinum, tá ið John er komin til Danmarkar, dugir landsliðsmaðurin enn ikki at siga, tí fyrst ræður um at fáa spælt heimligu kappingina lidna, og allarfyrst stendur grannauppgerðin móti HB fyri durðum.

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| Dagf. | Dystur |
|---|---|
| 12.09 | VB-B68 |
| 12.09 | Skála-KÍ |
| 12.09 | NSÍ-GÍ |
| 12.09 | ÍF-EB/S |
| 12.09 | HB-B36 |

**2. deild menn**

| Dagf. | Dystur |
|---|---|
| 11.09 | FSV-Sumba |
| 11.09 | LÍF-TB |
| 11.09 | AB-B36 |
| 11.09 | Royn-B71 |
| 11.09 | VB-KÍ |

**3. deild menn**

| Dagf. | Dystur |
|---|---|
| 12.09 | NSÍ-GÍ |
| 12.09 | Skála-SÍ |
| 12.09 | HB-Fram |
| 12.09 | TB-B68 |
| 12.09 | ÍF-EB/S |